# Nísa *Phocoena phocoena*

Niisa | Selhnisa | Nise | Nissu | Marsvin | Harbour porpoise


Nísa © Fernando Ugarte

Nísan er ein av minstu hvalasløgunum yvirhøvur. Hon livir bert á norðaru hálvu og einamest í strandarøkjum, men sæst eisini úti á víðum havi. Nísa kann eisini svimja niðan gjøgnum stórar áir!
Tær eru rættiliga styggar og halda seg vanliga frá bátum og skipum. Teirra høvuðsfíggindi er bóghvítuhvalurin, men summastaðni hevur springari og kópur eisini lopið á tær.

**Longd á vaksnum** 1.9 metrar
**Vekt á vaksnum** 75 kg
**Hámarksaldur** 8-10 ár
**Tað etur** fiskatorvur við smáfiski
**Bólkastødd** 1-8
**Ránsdjór** bóghvítuhvalir, áturkópar, stórir hávar
**IUCN-støða** minst stúran (2023)
**Ovurnøgd í Norðuratlantshavinum** 500,000
**Veitt í** miðaltal fyri 2019-2023
Grønland: 3,179 nísa/ár
Føroyar: nakrar fáar/ár

**Hóttanir:**

Hjáveiða | Dálking | Ljóðórógv

# Nísa *Phocoena phocoena*

Niisa | Selhnisa | Nise | Nissu | Marsvin | Harbour porpoise

Nísa sær øðrvísi út og ber seg øðrvísi at enn springari. Hon hevur eitt lítið, tríkantað horn og stuttan trón. Hon hevur tættan kropp og tenninar eru flatar, har springarar eru meira mjávaksnir og hava keyluskapaðar tenn. Nísur eru ikki so 'prátingarsamar' sum springarar, men bæði nísa og springari nýtir ekkólodding at navigera og finna fong. Nísur liva vanliga saman í smærri bólkum. Tilsamans eru seks nísusløg í heiminum.


Tríkantsskapað horn á nísu
© NOAA, NFSC


Nísa
© Solvin Zankl / Alamy, WWF

Enska orðið "porpoise" verður hildið at koma úr franska "porc poisson," sum merkir "svínafiskur!" Miðaldarliga katólska kirkjan góðtók ikki, at tað varð etið kjøt fríggjadag, so fólkið fann eftir øllum at døma ein útveg við at umflokka nísuna sum ein fisk. Vanligu nøvnini í teimum fýra NAMMCO-londunum eru øll sprottin úr fornnorrønu "hnísa," sum merkir "njósi," eftir ljóðinum, sum hoyrist, tá nýsa andar. Fyri at gera hurlivasan fullkomnan, stavar vísindaliga navnið Phocoena phocoena frá grikska orðinum "stórur kópur."

**Gransking:** Nísa má eta í minsta lagi 10 % av síni egnu vekt hvønn dag, samanborið við 3% hjá bóghvítuhvalinum. Hvi hevur nísan brúk fyri at eta so nógv..?

FOLD